## Lutaseðlar

**KUNOYAR SKÚLI**
Hesi nr eru ikki avheinta á lutaseðil hjá Kunoyar skúla:
11 dec nr 11,
12 dec nr 59,
13 dec nr 147,
16 dec nr 132,
18 dec nr 53,
23 dec nr 153. Kunoyar skuli tlf 456615. Stóra takk fyri stuðulin gott nýggjár
*Tlf. 456615*

## Matur

**NEYTAKJØT TIL SØLU**
Eskir (20 kg) blanda steik, suppukjøt og malið kjøt.
Slaktari hevur skorið og pakka klárt at koyra í boxina.
Kjøtið er av ungum vælfóðraðum mjólkneytum, ikki feitt.
Kjøtið kann latast um hálvan feb.
800 kr/eskjan.
*Ring 361057/220203*
*Miðstovugarður á Sandi*

**GRÝTUKLÁRIR NEYTAFJÓRÐINGAR**
til sølu.
*Tlf. 361188*

## Pløgg

**TROYGGJUR**
Ein opin troyggja 12-14 ár, 2 heilar troyggjur 6 ár. Myrkamorreyðar til sølu
*Tlf. 422434 el 265661*

**SKÓTABÚNI YNSKIST**
Grønur skótabúni 9-10 ár ynskist til keyps.
*Tlf. 322289/212289*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
verður sunnudagin kl. 16.00.
*NSÍ*

**SJAVSKAPPING**
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
*LÍF*

**SJAVSKAPPING**
verður á Svangaskarði mánadagin 17. januar kl. 18.30.
*Tofta Ítróttarfelag*

**SJAVSKAPPING**
verður mikukvøldið kl. 18.45.
*Eldrafelagið Nón*

**FRÁ TÓRSHØLL**
Sjavskapping verður týsdagin 18. januar kl. 19.00. Øll eru vælkomin.
*Tórshøll*

## Súkklur

**TIL SØLU**
Ein mini choppari til sølu, koyrir ca. 50-60 km.t.
*Tlf. 506463*

**SÚKKLUR**
Dreingjasúkkla 6-8 ár, 5 gear, sum nýggj. Til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 317099*

**TIL SØLU**
Vatnskutari bíliga til sølu.
*Tlf. 211235*

**TIL SØLU**
Ein spildurnýggj 26" mountainbike, alustell, kromfarva við 21 gearum til sølu fyri hávlan prís. 2.000,- kr.
*Tlf. 252829*

**TIL SØLU**
5 súkklur til sølu.
Ein Winter gentusúkkla 26" 300 kr.
1 stk. DBS damusúkkla 28" v/ 3 gearum, 300 kr.
1 Winter barnasúkkla v/ hjálpihjólum 150,- kr.
1 Forza 16" gentusúkkla 200 kr.
1 DBS Junior 16" gentusúkkla 300 kr.
*Tlf. 252829*

**CIQO PIAGO TIL SØLU**
Prutl við fótpedalum, ikki innreg. Er í sera góðum standi, til sølu fyri 2.000,- + eyka stell 2 eykamotor.
*Tlf. 252829*

## Teldur

**PS2 SPØL TIL SØLU**
Fifa 2004, Metal Gear solid 2, Freedom Fighters, Resident Evil, Onimusha Warlords. Samlað 1.000 kr. Ring ella SMS á
*504237*

**ROKNIMASKINA TIL SØLU**
Ein roknimaskina av slagnum, Hewlett Packard 48GX. tær vera t.d nýttar á maskinskúlanum. Sum nýggj, nýprísur 1800 kr, selist fyri 1000 kr. .
*Tlf. 507039*

**X-BOX SPØL TIL SØLU**
2 Xbox spøl til sølu: (X-men 2) og (Agent under Fire 007) 1 fyri 380 kr / bæði fyri 650 kr. ella í býti fyri Need for Speed Underground 2
*Tlf. 263584*

**NINTENDO 64**
við 12 spølum til sølu fyri 2.000,-
*Tlf. 521291/321291*

**HEVUR TÚ TRUPULLEIKAR**
við telduni? So vil eg fegin hjálpa. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 273865*

**X-BOX SPØL TIL SØLU**
Project Gotham Racing-Wreskless, DM Freestyle BMX 2, FIFA 2003, UFC, Spiderman, Dead of Alive 3, Hulk. Lítið brúkt, fyri 350 kr. stk.
*Tlf. 441861*

**PLAYSTATION 1**
við joystikk, í fínasta standi til sølu fyri 500 kr. + 5 spøl.
*Tlf. 310773*

**PS2 SPØL TIL SØLU**
fyri 300 kr. pr. stk. ISS3, This is football '04, ISS1, Spyhunter, Smugglers Run 2, Grand torismo 3, Hit man 2 og Men inBlack 2. Ella keyp øll fyri 2.000,- kr.
*Tlf. 253009*

**X-BOX SPØL TIL SØLU**
spølini eru Vexx og Project Gotham Racing 2, spælið VEXX kostar 250 kr. og hitt kostar 300 kr. men fá bæði fyribert 500 kr.
*Tlf. 503046/316552*

**SKRIVIMASKINA**
Lítið brúkt AEG Olympia elektronisk skrivimaskina til sølu fyri kr. 1.500,-
*Tlf. 222024*

## Tónleikur

**HEIMASTUDIO**
1 ára gamalt, nýprísur 12.500 við brennara, onki brúkt. Lægsta boð 4.500 kr.
*Tlf. 310273, Erland*

**60-ARA GUITARI**
Ein 60´ara el-gittar selist fyri 1900 kr. Guitarin sær út sum spildurnýggjur.
*Ring 317376*

**1 SETT**
Avance Omega 501 MKII hátalarar til sølu v/ veggbeslag. Lítið brúktir, til sølu fyri 1.200,-
*Tlf. 522012*

**2 STK. CELESTION**
G 12T-75 16 Ohm hátalarar til sølu. Teir eru 75w hvør. Fyri einans 1.000,- tilsamans.
*Tlf. 522012*

**TIL SØLU**
Marshall '6100 LM Anniversary Series' toppur, nýggj rør, 5.000,- Mesa/Boogie 'Duar Rectifier' toppur, nýggj rør, 10.000,-
*Tlf. 223735, Heri*

**SÚLUHÁTALARAR**
Tveir brúktir Dali SL-7 súluhátalarar til sølu. Max. 111 dB. Nýprísur uml. 4.000 kr./stk.
*Ring á 212832*

**KASSAGUITARI**
Góður guitari, K. Yairi, við stórum kroppi, innb. B-band mikrofon og kuffert, til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 421419*

**GUITARI TIL SØLU**
Ein custem made El-Yamaha guitari til sølu fyri 5.000,- (Nýprísur 12.000) og ein Boss turdo-distortion guitar pedal fyri 500,- (Nýprísur 1250,-).
*Tlf. 253009*

## Út- & Sjónvarp

**YNSKIST BÍLIGA**
Eitt uml. 20" sjónvarp við DVD ella video innbygt ynskist til keyps.
*Tlf. 314797 ella 514797*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Ein analogur parabolmóttakari ynskist til keyps.
*Tlf. 504078*

## Ymiskt

**ÁRSVEITSLAN**
hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagnum Varðanum.
Ársveitslan verður í bygdarhúsinum leygarkvøldið 12. februar kl. 19.30. Allir hósvíkingar úti og heima eru vælkomnir.
Veitslan kostar 180 kr. Seinasta freist at keypa sær atgongumerki er mánakvøldið 7. februar kl. 22.00 í handlinum hjá Jóannesi.
Borðreitt verður við feskari súpan, lambskjøti og oman ís við frukt.
Góður dansur og skemt.
*Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagið Varðin*

**DIGITALT VIDEOKAMERA**
Panasonic DV videokamera í sera góðum standi, nýprísur kr. 6000,- til sølu fyri kr. 2.500,-
*Tlf. 213210*

**KOL**
Nakað av koli fæst við at avheinta tað.
*Tlf. 421097 eftir kl. 17*

**RADIATORUR**
50 x 55 við Danfoss termostati til sølu fyri 300,- kr.
*Tlf. 311267/511267*

**GERIÐ KVETTIÐ**
Nokia 7250i til sølu fyri 1500 kr. og ein Siemens ME45 til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 265343*

**VIDEOKAMERA**
Sony mini-dv handycam til sølu fyri kr. 5.000,-, 3 mðr. gamalt.
*Tlf. 317034*

**DIGITAL KAMERA**
Digital kamera 6,6 megapixel til sølu fyri 1.600,-kr. Nýtt.
*Tlf. 272908*

**TRAPPA TIL SØLU**
Innandura trappa til sølu breidd 102 cm, ? sving høgra niður. Prísin kunnu vit tosa um.
*tlf. 517526*

**TIL SØLU**
Glerfoss málningur selist um nóg gott boð fæst!.Støðd: 60 X 92 cm - Navn: Støða 9 - 1986
*http://www.geocities.com/kavafl ykra/glerfoss.html*

**HURÐ TIL SØLU**
Ein innandura fyllingshurð, massiv fura, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 317099*

**BÍLIGT DIGITAL MYNDATÓL!**
Óbrúkt mini digital myndatól til sølu fyri einans 300kr. Kann eisini brúkast sum webkamera. Sjálvandi fylgir leidningur og fløga til telduna við.
*Ring 214789*

**FARTELEFON TIL SØLU**
1 ára gomul blá Sony Erichsson Z 200 til sølu fyri 1200,00
*Ring 361159*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG 20 ÁR**
Í sambandi við at Sunda Pensionistafelag hevur 20 ára stovningardag, verður hugnaløta 3. februar 2005 kl. 18.30 í Eydnuni á Oyrabakka fyri limun og innbodnum. Sigast skal frá luttøku í seinasta lagi 28. januar á telefon 423357 og 422055.
*Nevndin*

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
Ein teak úthurð óbrúkt/ óútpakka til sølu fyri hálvan prís.
*Tlf. 212099/442099*

**KOPARRØR TIL SØLU**
1 stk. 4" rør gult, l. 2.07 cm.
1 stk. 4" rør grátt, l. 57 cm.
1 stk. 4" bend 45o,
2 stk. 4" bend 67o,
1 stk. 4" bend 15o,
1 stk. niðurløp,
1 stk. hvítt úr vask,
2 stk. T-rør, til vask, støðd 40 x 88,5.
*Tlf. 271723*

**DYKKARA ÚTGERÐ TIL SØLU**
er í góðum standi.
*Tlf. 228997*

**TIL SØLU VEGNA FLYTING**
Vektbonkur, Ketler Classic + 3 stengur og 50 kg. í vektum kr. 4.500,- Rygg og búk venjingarbonkur 500 kr.
*Tlf. 322271/250290 e. kl. 17*

**JØRÐ TIL SØLU**
03 gyllin 00 skinn uttangarðs í Sandarhaga á Sandi við tilhoyrandi innangarðsjørð á Sondum, 4.975 fermetrar er til sølu, um hóskandi boð fæst. Nærri við at ringja um dagin til
*tlf. 361570*

**HEY HEY**
Vit hava at hava eina stuðulskonsert til frama fyri skóta landslegu í Danmark við vælumtókta Magna Christiansen og Kirkjukórinum í Vestmanna í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 29. januar kl. 20.00. Eisini fara vit at selja lutaseðlar, møti fjølment. Øll eru hjartaliga vælkomin. Børn atgongd saman við vaksnum.
*KFUM-skótarni í Kvívík*

**VINDEYGU TIL SØLU**
2 vindeygu til sølu, í góðum standi, HTH vindeygu mát 140 x 100 og hitt 130 x 140, 500 kr. stk.
*Tlf. 227853*

**H-VINDEYGA**
1 nýtt H-vindeyga 68 x 73 cm. til sølu. Vinarliga ringið
*tlf. 223845/373645*

**FRÁ OYÍF**
30 ára ársveitslan hjá Oyndarfjarðar ítróttarfelag, verður í hølinum hjá felagnum 5. februar kl. 19.00, Hilmar Jan undirheldur og Juliannuboys spæla til dansin, kostnaður kr. 150,-
Tekningarlisti liggur í handlinum hjá Eivind Petersen ella ringjast á tlf. 444918 og 444539.
Seinasta freist at tekna seg er 29. januar.
*Nevndin*

**TIL SØLU**
Ein Motorola V66 fartelefon til sølu fyri 800 kr. ella kunnu vit tosa um prísin. Vinarliga ring
*tlf. 253063/318667, Súsanna*

i
Sosialurin

# Tíðindaskriv frá Føroya Fróðskaparfelag

**Fróðskaparrit 52 er útkomið. Hesu ferð er bókin 157 síður og hevur 8** greinar

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Firouz Gaini er sosialantropologur og PhD-lesandi á Fróðskaparsetrinum. Hansara granskingarverkætlan snýr seg um ungdómsmentan í Havn. Í tí sambandi hevur Firouz skrivað um at Fiska ella ikki fiska. Fatan føroyskra ungdómsins av fiski og fiskiskapi.

Eisini í hesum Fróðskaparriti verður føroyskt staðarnavn viðgjørt. Eivind Weihe skrivar um Jarðarnavnið Strapulið í Miðvágir.

Hjalmar P. Petersen hevur skrivað um føroyska málið í fleiri av teimum seinastu Fróðskaparritum, og bók 52 er einki untantak. Í hesum er grein um ómarkaði kyn í føroyskum.

Enn ein doktaralesandi hevur skrivað. Erla Olsen á Náttúrugripasavninum er doktaralesandi við Lærda Háskúlan í York í Onglandi og kannar sambandið millum soppar og plantur? her við greinini Mychorhiza á fínagras.

Vátlendi í Føroyum hevur sjáldan verður viðgjørt vísindaliga. Tað er tí gleðiligt, at nú kemur ein grein um Klukkur í vátlendi í Føroyum. Skrivað hevur onglendingurin Garth N. Foster saman við Janusi Hansen, ið starvast á Náttúrugripasavninum.

Í tíðarskeiðnum 1978-1981 varð ein kanning gjørd av smákyktum á landi. Hetta var samstarv millum Náttúrugripasavnið og lærdu háskúlarnar í Bergen og Lund. Tá vórðu eiturkoppar innsavnaðir í stórum nøgdum. Fyri at kanna, um broytingar eru hendar síðani í samansetingini av sløgunum og útbreiðslu teirra hava Sven-Axel Bengtson, Pehr Henrik Enckell, Dorete Bloch og Erling Hauge skrivað um Eiturkoppar (Araneae) í Føroyum: eitt endurskoðað yvirlit og ein dagføring av útbreiðslu innanoyggja.

Heilsufrøðiliga Starvstovan ger kanningar av innihaldinum av eitrandi evnum í føroyska umhvørvinum, eitt nú í teistum. Maria Dam, Katrin Hoydal og Jens-Kjeld Jensen hava viðgjørt tilfarið í Kyksilvur í livur, eggum og fjøður frá teisti í Føroyum.

Kyksilvur hevur verið nógv umrøtt tey seinastu árini í fleiri stórum kanningum, bæði av fólki, grind, fiski og sjófugli. Hetta hevur Maria Dam savnað saman í greinini Kyksilvur í Føroyum ? ein gjøgnumgongd av tøkum dátum. Ein góð yvirlitsgrein, ið er hent at brúka í hægri undirvísing.

Eins og í Fróðskaparritum frammanundan verða tey nevnd, ið hava fingið doktaraheiti (Nýtt innan vísindi í 2003). Eisini er yvirlit yvir tað, sum granskarar innan- og uttanlands hava útint av vísindaligum avrikum av ymsum handa slag um føroysk viðurskifti í 2003 (Vísindarverk 2003).

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!